# Best við tveimum flogvøllum

**Tað besta fyri flogferðsluna í Føroym hevði verið at havt ein tiltaksvøll onkra aðrastaðni í landinum at knýttan at flogvøllinum í Vágum. Soleiðis hevði reglusemið verðið mestsum optimalt, heldur stjórin á Atlantsflogi**



Mynd - Atlantsflog
Myndatekstur:
*Flogførini, sum Atlantsflog brúkar, eru sera vælegnað til flogvøllin í Vágum. Men varð vøllurin longdur, vórðu eisini fleiri møguleikar at velja í, tá flogførini skulu skiftast út, sigur stjórin í Atlantsflogi*
*Mynd: Edvard Joensen*

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:**
Flogvøllurin í Vágum riggar betri, enn umdømið hann hevur fingið. Men best hevði verið at havt ein tiltaksvøll onkra heilt aðrastaðni í landinum, lagdan soleiðis, at veðurlíkindi ikki eru tey somu sum í Vágum, sigur Magni Arge stjóri á Atlantsflogi.

Í viðmerking til tosið um flogvallarútbygging, sigur Magni Arge, at tað, sum einamest umráðandi er við flogferðslu, er góður »regularitetur«. Tað at flogferðslan er reglulig, og at ferðafólkini kenna seg trygg.

Í so máta hevur vøllurin i Vágum riggað heilt væl, tó at tað kemur fyri, at tað onkuntíð ikki er lendandi orsakað av veðri.

Tí hevði tað allarbesta verið at havt tveir flogvallir í Føroyum, sigur Magni Arge, sum í sama andadrátti ásannar, at tað verður ikki í bræði, at slíkt verður gjørt.

Hann heldur tó ikki, at tað skuldi verið ein flogvøllur afturat, sum skal kappast við vøllin í Vágum, men ein tiltaksvøllur, sum lá soleiðis fyri at har var lendandi, um líkindi ikki vóru í Vágum.Og so skuldi hann aftur at tí ligið soleiðis, at landfast er í Vágar.

Tað er nevniliga so, sigur Magni Arge, at tá flogførini ikki fáa lent í Vágum, enda øll ferðafólkini aftur uttanlands, og tað hevur viðhvørt keðiligar avleiðingar við sær. Kundu tey hinvegin lent aðrastðani í Føroyum, vóru tey komin upp á pláss og kundu avgreitt síni ørindi.

Magni Arge ásannar, at ein leinging av flogvøllinum ikki bara av sær sjálvur loysir teir trupulleikar, sum kunnu vera við flúgving.

Atlantslfog arbeiðir alla tíðina við tankanum um at skifta flogførini út, og varð vøllurin longdur bara einar 200 metrar ella so, vóru valmøguleikarnir væl betri enn í dag, tá leitast skal eftir hóskandi flogførum ásannar Magni Arge.

Hinvegin sær hann ikki nakran fyrimun í at leingja vøllin hundraðvís av metrum fyri at fáa møguleika fyri at brúka størri flogfør.

Tað vildi bara gjørt tað, at frekvensurin lækkaði. Tað vil siga færri fráferðir og komur. Og tað er afturstig, tí ein tann besta tænastan, ein kann geva flogferðafólki, er júst tað, at flogið verður ofta.

Í dag verður flogið bæði morgun og kvøld. Og støddin á flogførunum,sum Atlantsflog brúkar, er nakað nær tí best egnaða yvirhøvur til tørvin, sum er til flúgving upp á Føroyar, heldur hann.

Men Magni Arge er ikki í iva um, at ein útbygging hevði havt nógvar fyrimunir við sær.

# Rímiliga ruddiligt

**Nú flettingin er við at vera liðug hjá teimum flestu, láta tey væl at á brennistøðini hjá IRF. Fólk eru rímiliga røsk at leggja avfallið í bingjurnar, sum settar eru upp til tað sama. Men enn er onkur, sum brúkar ánna til at sleppa av við avfallið frá flettingini**



*Tað gongur betri at fáa fólk at brúka tær uppsettu bingjurnar, og tí verður tað sjáldsamari at síggja innvøl av seyði sløðast fram við sjóvarmálanum og í áunum, hóast tað enn kemur fyri*
*Mynd: Edvard Joensen*

FLETTINGIN
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Fólk brúka sum heild bingjurnar hjá IRF, sum settar eru upp til serliga at taka í móti tí, sum eftir liggur frá flettingini. Men ikki allar vembur verða tømdar kortini.

Summastaðni eru tað tó enn fólk, sum bara blaka frá sær uttan fyrilit, veit onkur lesari at siga frá. Í onkrum bygdum verður áin enn nýtt at taka í móti innvølum av øllum slagi. Vembur og vil fara ótømd í ánna, og so liggur tað og sleingist um steinarnar og fram við áarbakkan. Tað er ikki í lagi, vísir lesarin á.

Á brennistøðini hjá IRF í Leirvík, hava tey ikki havt teir stóru trupulleikarnar av flettingini í ar, verður sagt.

Jógvan Júst Olsen, leiðari fyri innsanvingini, sigur, at í ár havur verið av tí frægasta, hóast nakað nógvar vembur koma ótømdar í bingjurnar. Og tað er ikki í lagi, vísir hann á. Tær skulu tømast, áðrenn tær verða koyrdar í bingjuna.

Hann sigur, at tey vita ikki heilt, hvussu stóran part av tí, sum kemur frá flettingini, ið verður sent til Leirvíkar at brenna. Men ein rímiliga stórur partur man tað vera, halda tey.

Fleiri av teimum, sum fletta heilt nógv, hava leigað bingjur frá IRF at koyra í, sigur Jógvan Júst Olsen. Og tað lættir væl um hjá teimum, sum savna inn, at teir vita, at her er bara slíkt avfall í.

Verri er, sigur Páll Vík, sum er leiðari fyri brennigni hjá IRF, tá ótømdar vembur verða blakaðar í bingjurnar, sum standa á vanligu bningjuplássunum til annað rusk.

Tað er nakað lort, tá pressubilurin trýstir hetta saman, og ótømdar vembur bresta og spræna allan lortin í kring seg, heldur hann.

Annars letur hann at, at tað gongur væl at brenna undan. Serliga tá teir vita, at í bingjunum er bara slíkt, sum kemur frá flettingini. So fáa teir lagt til rættis eftir tí.

Tað eru tó ikki bara innvølirnir, sum verða koyrdir á brennistøðina, sigur Páll Vík. Eisni nakað nógv skinn enda í ovninum. Tey eru eisini tung at brenna, men enn hevur tað ikki hindrað brenningini nakað nevnivert, sigur hann.

Jógvan Júst Olsen sigur, at tað hevur bøtt væl um, at bingjuplássini kring landið nú tey flestu eru mannað. Soleiðis fáa fólk eisini vegleiðing um, hvussu tey skulu bera seg at. Eisini hava nógvar kommunur sett bingjur upp, sum burtur av eru til slaktiavfall, sigur hann.

Teir meta á IRF, at nú man meginparturin av slaktiavfallinum vera komin fyri í ár, so einaferð inn í november verður alt brent undan fyri hesaferð.



*Tað allarmesta av slaktiavfallinum fer í bingjur hjá IRF og verður brent. Tað hindrar ikki brenningini annars, tá rætt verður atborið, og eitt nú vemburnar tømdar, áðrenn tær fara í bingjuna, siga tey á brennistøðini*



# Tita, Guðrið og Astrid í Oynni

**Sunnudagin lótu 3 listakvinnur upp spennandi listaframsýning í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Sýningin nevnist "Dyr" og hevur ferðast her heima og í Íslandi**





LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tita Vinther, Guðrið Poulsen og Astrid Andrerasen sýna í hesum fram í Suðuroynni. Gallarí Oyggin hevur fingið í lag samstarv við listakvinnurnar og er hetta framsýning, sum hevur verið uttanfyri landoddarnar og í Føroyum.

Listakvinnurnar hava samstarva um at sýna fram í nøkur ár. Henda framsýningin er rættuliga støðug og hevur uppruna í Listastevnuni 2002, har sýnt varð fram í Grasagarði í Havn.

## Ísland

Tær hava eisini verið á forvitnisligari sýning í Íslandi við hesi sýningini. Har var serstakur karmur um sýningina.16 kvinnur sýndu fram í sonevnda Lystigarðinum á Akureyri. Ein botaniskur aldingarður.

Íslendska tíðarriti Sumarhúsið og garðurinn hevur í hesum sambandi grein um sýningina og letur væl at - eisini føroysku listakvinnurnar fáa serstaka umrøðu og viðtal.

Sýningin, sum nú eisini er at síggja í Suðuroynni, hevur ymiskt at bjóða. Og sýningin er bæði úti og inni og eru umstøðurnar eisini sera góðar á staðnum við vakra og serstaka aldingarðinum, sum er kring Oynna.

Tita er vevkona og nýtir millum annað mannahár til síni listaverk. Guðrið er keramikari og eru tað bæði myndir og standmyndir, ið eru at síggja. Astrid Andreasen nýtir ymsar hættir og ymiskt tilfar og merkjast listaverkini eisini av hesum og eru sera ymisk. Har er akvarel, litografi, bundið, pappmaché og eisini eitt mála træ við stærahúsum.

Listakvinnurnar hava í nakrar dagar arbeitt við at seta sýninginaog uppvóru eisini við til ferniseringina sunnudagin. Áhugin var stórur og nógv fólk stakk inn á gáolvið til mikla gleði fyri hesldur ovfarnu listakvinnurnar, ið ikki tóktust hava væntað sær so stóra fjøld.

Hóast sera ymiskar, so eru tær vanar at samstarva og tær siga, at tær stuðla hvørji aðrari bæði í listaverkunum, har t.d. onkur er meira litrík enn onnur, og eisini sum persónar hóska tær saman.



FAROE
LAW

bjóðar heimligar og
altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo




**Klár at heinta**

**3. bind á posthúsunum**

**Bind III av »Skálvíksdrongi Sildarkongi«, endurminningunum hjá Eileri Jacobsen**




**»Váði og vælferð«**

Tíðarskeiðið 1986 til 2003

***Skálkur ella hetja?***

***Hvussu hugsar og handlar hesin maðurin?***

***Ja, hvør er hesin Eiler?***







- hvørs manningar við Ísborg, Sólborg I, II og III, Norðborg, gomlu Krúnborg, Háborg og nýggju Krúnborg, hava verið stoltleikar í føroyska fiskiflotanum,
- ***hava landað fisk fyri íalt 1,6 miljard kr (= 3 mia kr í dagsprísum),***
- hava goldið 500 mió kr í hýrum (= 1 miljard krónur í dagsprísum),
- ***sum næstan 70 ára gamal bygdi nýggju Krúnborg fyri 120 mió kr?***

**Lesið um henda Føroya lands og havsins son í bindi III av »Skálvíksdrongi Sildarkongi«**

**Tit, sum bíløgdu bind I og II, kunnu heinta bókina á Posthúsinum.**

**»Váði og vælferð« er 454 blaðsíður, hevur yvir 400 myndir, 100-tals fólkanøvn og kostar tað sama sum fyrru bøkurnar, bert 190 kr (+ postgjald).**